Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

# Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 13.12.2018 kl. 20:00 |
| **Málnr.:** | |
| Nevndarlimir:: | Jóhan Christiansen<br>Hanna Jensen<br>Brandur Jacobsen<br>Árni Jacobsen<br>Hjalti Dalheim<br>Tollakur Joensen<br>Hans Mourits Foldbo<br>Gudny Langgaard<br>Uni Rasmussen |
| Vara limir: | |
| Ikki møtt: | Brandur Jacobsen |
| Nevndarskrivari: | Erik Lervig |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Mál til viðgerðar** | | | |
| 74/18 | 18/00215-16 | Tilmæli - Umsókn um útbygging av sethúsum - matr. nr. 169 í SG | 3 |
| 75/18 | 18/00419-1 | Eykajáttan November 2018 | 5 |
| 76/18 | 18/00429-1 | Tilmæli til mál nr. 18/00429 - Jóannis Kristiansen, list og karmar | 6 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 77/18 | 18/00412-2 | Tilmæli - Umbøn um ummæli av jarðarkeypi - 103a í Syðrugøtu | 8 |
| | | | |

## 74/18 Tilmæli - Umsókn um útbygging av sethúsum - matr. nr. 169 í SG

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.10.2018 | 37/18 | 18/00215-16 |
| 2 Býráðið | 29.10.2018 | 64/18 | 18/00215-16 |
| 3 Byggi - og býarskipanarnevnd | 10.12.2018 | 47/18 | 18/00215-16 |
| 4 Býráðið | 13.12.2018 | 74/18 | 18/00215-16 |

**Málslýsing:**

Málið var fyri á býráðsfundi 29-10-2018, tá bleiv samtykt at koyra málið aftur til viðgerðar.

Eysturkommuna hevur móttikið eina umsókn um umbygging á matr. nr. 169 í Syðrugøtu.

Umsøkjarin hevur ætlan at byggja núverandi hoyggjhús til bústað og knýta tað uppí verandi sethús.

Hoyggjhúsið verður bygt um til bústað, tískil má tað lúka krøvini til "Einbýlishús".

Ætlaða umbyggingin av hoyggjhúsinum viðførur at:

- Hæddin, sum nú er 3.8 metrar, hækkar við 1.2 m, tað vil siga at hoyggjhúsið verður 5 metrar
- Frástøðan til grannamark verður 0.5 m.

Ætlaði millumbygningur og svalagongd viðførur at:

- Frástøðan frá hús til kommunala veg minkar frá 1.3 m til 1 m, har kravið er 2.5 m.

Sambært BK17 pkt.2.2.3.2 (Einbýlishús) er krav, at:

- *minsti fráleiki til veg, gøtu og grannamark skal vera 2.5 m*.

Sambært BK17 pkt.2.2.3.4 stk. 2 (smáir bygningar)

- *Verður bygningur sbrt. Stk. 1 gjørdur nærri vegi, gøtu ella marki enn 2.5 m, skulu treytirnar í nr. 1-4 vera loknar*.

1. *Eingin partur av útveggjum ella tekju á bygninginum, íroknað møguligan brandkamb, má, innan fyri ein fráleika á 2,5 m frá marki, vera hægri enn 2,5 m yvir planeringshædd*.

2. *Síða, sum er nærri marki enn 2,5 m, má ikki vera longri enn 8,0 m. Eru fleiri síður, sum eru nærri marki enn 2,5 m, mugu tær tilsamans ikki vera longri enn 12,0 m*. (Hetta er ikki relevant í hesari umsókn).

3. *Vindeygu, hurðar ella líknandi op mugu ikki vera ímóti grannamarki.*

4. *Takvatn skal haldast inni á egnum grundøki.*

| |
|---|
| Út frá hesum metir umsitingin, at tað ikki er raðiligt hjá ánara av matr.nr. 169 í Syðrugøtu, at byggja nærri at grannamark, enn tað longu er í verandi løtu. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir frá at ganga umsókn um frávik á matr. nr. 169 í Syðrugøtu á møti.<br><br>**Ískoyti 10.12.2018**<br>Umsitingin mælir frá at ganga umsókn um frávik á matr. nr. 169 í Syðrugøtu á møti. |

**Viðtøka Byggi - og býarskipanarnevnd 19. oktober 2018**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini.

**Viðtøka Býráðið 29. oktober 2018**
Einmælt samtykt at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina til viðgerðar.

**Viðtøka Byggi - og býarskipanarnevnd 10. december 2018**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at ganga umsókn um frávik á matr. nr. 169 í Syðrugøtu á møti.

**Viðtøka Býráðið 13. december 2018**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

# 75/18 Eykajáttan November 2018

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 29.11.2018 | 76/18 | 18/00419-1 |
| 2 Býráðið | 29.11.2018 | 73/18 | 18/00419-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | 12.12.2018 | 78/18 | 18/00419-1 |
| 4 Býráðið | 13.12.2018 | 75/18 | 18/00419-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víst verður til hjál. skriv dagfest 23/11-18.<br><br>Sum tað framgongur av hesum skriv so er ein meirnýtsla á nøkurum av íløgunum sum eru gjørdar í ár, men kann fígging finnast innan somu grein til flestu av hesum meirnýtslum, tó verður neyðugt at veita eina eykajáttan á 600 t.kr. til Ráðhúsið í Norðragøtu<br><br>**Ískoyti 11. desember 2018**<br>Eingin broyting frá 1. viðgerð |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Samlaða úrslitið hjá komununi verður 600 t.kr. lægri enn ætlað, og gjaldføri minkar samsvarandi. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at veita eykajáttan til býráðshúsið á 600 t.kr., og annars fíggjað meirnýtsluna eins og greitt frá í skrivi dagfest 23/11-18 |

**Viðtøka Fíggjarnevnd 29. november 2018**
Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan sambært hjál. skajli. dagfest 23. november 2018

**Viðtøka Býráðið 29. november 2018**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini, men eykajáttanin verður lækkað til 300 t.kr.

**Viðtøka Fíggjarnevnd 12. december 2018**
Einmælt samtykt eins og við 1. Viðgerð.

**Viðtøka Býráðið 13. december 2018**
Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð.

## 76/18 Tilmæli til mál nr. 18/00429 - Jóannis Kristiansen, list og karmar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 10.12.2018 | 76/18 | 18/00429-1 |
| 2 Býráðið | 13.12.2018 | 76/18 | 18/00429-1 |

**Málslýsing:**

**Jóannis Kristiansen, list og karmar**
**– eitt stig longur á leið í sambandi við hundrað árið fyri føðing listamansins í Leirvík**

Uppskot:
Í sambandi við 100 føðingarár listamansins, Jóannis Kristiansen, í 2018, tekur Eysturkommuna stig til at leiða og samskipa eitt arbeiði við at menna karmarnar kring list eftir Jóannes Kristiansen í heimbygdini, Leirvík, og við at menna sjálvt savnið, úrval og miðlan av listini.

Viðmerkingar:
Hin 12.februar í ár vóru hundrað ár síðani Leirvíksmálaranum, Jóannis Kristiansen, varð føddur. Í hesum sambandi læt upp forkunnug serframsýning við einum hópi av málningum hansara á ovastu hædd í bygninginum, har Bátasavnið hevur innivist á miðhæddini. Hetta er gamla turkihúsið í Leirvík, sum í ár 2000 læt upp sum Báta- og Listasavn.
Hetta var eitt høvi at dvølja við hendan mentanararv, sum hevur sína rót í Leirvík, og undir fyrireikingunum til serframsýningina gjørdist greitt, at fleiri – bæði einstaklingar og vinnufyritøkur – meta, at nú eiga fleiri og størri stig at verða tikin, so tann listin eftir Joannis Kristiansen, sum longu hoyrir til Báta- og Listasavnið eins og list, sum í framtíðini kann verða savnað í Leirvík, fær meira fokus og bøttar karmar yvir tíð.
Tað snýr seg m.a. um at fáa yvirlit yvir, hvussu "bygdin" kann ogna sær ella langtíðarleiga eitt hóskandi úrval av list hansara frá ymisku tíðarskeiðunum, um at lýsa ein framtíðar karm, sum hóskar til list eins og at viðgera samstarv millum kommunu, vinnulív, mentanarlívið og aðrar áhugapartar um eitt arbeiði kring list og lívssøgu Jóannis Kristiansens.
Býráðið kundi hóskandi, áðrenn 2018, hundrað-árið fyri føðing listamálarans, rennur út, tikið eina prinsippiella avgerð um at seta í gongd arbeiði at menna karmarnar kring listina hjá Jóannisi.
Í komandi døgum eigur so at verða samskift við allar viðkomandi áhugapartar, so at semja kann fáast um ítøkilig mál, arbeiðsleist og áramál fyri at náa hóskandi úrslitum.
Sí annars sending hjá Kringvarpi Føroya um Báta- og Listasavnið og um 100–ára framsýningina, hin 23/3 2018: http://kvf.fo/sending/lyst?sid=79002

**Fíggjarligar avleiðingar:**

| Tilmæli |
| --- |
| |

**Viðtøka Mentanarnevndin 10. december 2018**
Mæla til at fólk verður sett á uppgávuna at seta í gongd og samskipa eina ítøkiliga ætlan at menna karmarnar kring list eftir Jóannes Kristiansen í heimbygdini, Leirvík, og við at menna sjálvt savnið, úrval og miðlan av listini.

**Viðtøka Býráðið 13. december 2018**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

## 77/18 Tilmæli - Umbøn um ummæli av jarðarkeypi - 103a í Syðrugøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 10.12.2018 | 49/18 | 18/00412-2 |
| 2 Býráðið | 13.12.2018 | 77/18 | 18/00412-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið skriv frá Búnaðarstovuni viðv. umsókn um loyvi at keypa uppískoytisstykki av festinum matr.nr. 103a í Sýðrugøtu.<br><br>Umsóknin ljóðar:<br>*"Undirritaðu hjún søkja um at fáa lutin matr. nr. 103a í Syðrugøtu til keyps og lagdan saman við matr. nr. 52.*<br><br>*Á matr. nr. 52 standa elligømul serstøk hús, sum vit vilja varveita."*<br><br>Eysturkommuna er biðin at ummæla hetta. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin viðmælir, at ganga umsókn hjá festara um keyp av uppískoytisstykki av festinum matr.nr. 103a í Sýðrugøtu. |

**Viðtøka Byggi - og býarskipanarnevnd 10. december 2018**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til fylgja tilmælinum hjá umsitingini.

**Viðtøka Býráðið 13. december 2018**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

fundurin lokin kl. 21.30

__________________________
Jóhan Christiansen

__________________________

Hanna Jensen

Árni Jacobsen

Hjalti Dalheim

Tollakur Joensen

Hans Mourits Foldbo

Gudny Langgaard

Uni Rasmussen